# Tónleikasending til útbjóðingar

**Arbeiðsheiti:** Mono
**Miðil:** Útvarp/heimasíða
**Hvat:** Ein vikulig tónleikasending í fimm pørtum í vetrarskránni 2022/23, t.e. frá september 2022 til juni 2023
**Longd:** 50 minuttir
**Innihald:** Ymisk tónleikasløg
**Staðseting:** Mentan, Kringvarp Føroya
**Redaktionell ábyrgd:** Mentan

## LÝSING

Talan er um tónleikasending, sum verður gjørd í røðum við fimm pørtum hvør. Tað merkir, at tú bjóðar teg til at gera eina røð við fimm tónleikasendingum, har tú sjálv/ur gert av, hvat fyri slag av tónleiki, tú hevur hug at lýsa og spæla. Eftir tær fimm sendingarnar, tekur ein annar vertur yvir.

## KRØV TIL TILBOÐSGEVARA

Eina lýsing av hvat fyri slag av tónleiki, tú hevði kunnað hugsað tær at spælt, og hvussu tú hevði hugsað tær at lagt sendingina til-rættis. Tað veri seg tónleikaval, hvussu send-ingin skal byggjast upp og tín vertsleiklutur.

## KRØV TIL TILBOÐIÐ

Góða útvarpsrødd, gott føroyskt mál og holla vitan um tónleik.

## KRINGVARP FØROYA KANN VEITA

- Upptøkuhøli
- Atgongd til savn
- Keyp av tónleiki
- Útgerð
- Ljóðtøkning
- Redaktør

## LØN

Løn/samsýning verður latin sambært avtalu.

Kringvarpið tilskilar sær rættin til at leggja dent á yrkisføri og veitingartrygd.

Kringvarpið tilskilar sær somuleiðis rættin til at vraka øll innkomin tilboð.

Freistin at bjóða seg fram til at gera sendingina er 29. august 2022

Umsókn skal sendast til teldupostbústaðin: utbod@kvf.fo

KRINGVARP FØROYA

Kringvarp Føroya er sjálvstøðugur almennur stovnur, sum virkar óheftur av politisku skipanini. Eitt stýri við sjey limum stjórnar stovninum.
Virksemið verður fíggjað við kringvarpsgjaldi og inntøkum frá kunngerðum, ískoytisveitingum og eydnuspølum.
Kringvarp Føroya hevur fýra deildir: Aktuelt, Mentan, Tøkni og Fyrisiting.